Umhvørvisvikan í Havn:

# Ídnaðarøkið á Oyrareingjum ein køstur


















*Fólkið á Oyrareingjum halda, at tey hava verið við sviðusoð nú umhvørvisvikan í kommununi er av, men kommunan lovar, at økið verður ruddað innan fyri teir næstu mánaðirnar*

*mynd Jens Chr. Vang*

**Í farnu viku var umhvørvika í Tórshavnar Kommunu. Kommunan fevnir um nógvar bygdir og eitt stórt øki, men øll vóru tó partur av umhvørvisvikuni, har tey høvdu ruddingardagar, skiltu rusk, ókeypis busskoyring, gongutúrar og mangt annað. Men ídnaðarøki á Oyrareingjum sær framvegis út sum ein køstur**

UMHVØRVI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í einum faldara kommunan hevur latið gjørt, serliga ætlaður til skúlarnar, er ein rúgva av hugskotum og góðum ráðum um, hvussu og hvat ein kundi gera nú umhvørvisvika var.

"Gangi fram við sjóvarmálanum og í fjøruni. Hvat finna og síggja tit? Hvat hendir við deyða fuglinum? Brotna glasinum, plastdunkunum ella oljublettunum, sum tit finna í fjøruni?" Soleiðis verður millum annað spurt í faldaranum, og akkurát hesar spurningar hava tey, sum búgva á Oyrareingjum spurt longi. Men tey hava eisini spurt, og spyrja enn, hvat hendir við lastbilavrakunum? Hvussu verður við mongu bilvrakunum, maskinlutunum, tangunum, bingjunum, aliringunum og øllum ruskinum annars, sum liggur og flýtur á ídnaðarøkinum har tey búgva?

## Bingjuhavn ella bukvald?

Ben Arabo býr á Oyrareingjum, og harvið er hann borgari í Tórshavnar Kommunu. Men eftir at umhvørvisvikan nú er av, og ídnaðarøkið framvegis liggur órørt, er hann farin at ivast í, um býráðspolitikkararnir vita av smáu plássunum sum Oyrareingir: – Eg havi glett meg til at umhvørvisvikan byrjaði, tí tá trúi eg, at kommunan fór at rudda upp her inni. Men nú vikan er av ivist eg í, um teir yvirhøvir vita av okkum, sigur Ben Arabo av Oyrareingjum.

Eitt er, at ídnaðarøkið sær farligt út, men tað er ein sannroynd, at tað eisini er eitt vandamikið pláss hjá børnum at ferðast í. Økið er á onganhátt innihegnað ella avbyrgt, og vit vita øll, at pláss sum hesi, eru sera spennandi hjá børnum at leita til, og tí síggjast børn javnan spæla á økinum. Men hetta er ikki vandaleyst, tí tað er ógvuliga lætt at koma til skaða millum alt tað gamla jarni og knústa glasi sum har er – Børnini dáma jú sera væl at spæla har, men vit vaksnu eru sum vera mann minni glað fyri hetta. Vit siga tað børnini, um ikki at spæla har, men tá økið ikki er hegnað av, ja so er kunnu tey fara har akkurát tá teimum lystir, staðfestir Ben Arabo.

Kommunan eigur økið á Oyrareingjum, og tí er tað eisini teirra ábyrgd at halda økið reint og ruddiligt. – Eg skilji ikki heilt hvussu tingini hanga saman í umhvørvisvikuni, men á Oyrareingjum nyttar onki við hundalortastativum ella kunning um vistfrøðiligan kosmetikk, heldur Ben Arabo fyri, sum víðari sigur, at hann er heldur hetta minna mist um hann, sum fór at pussa vindeygu meðan hann stóð við lortið upp undiir knøini.

Og tað er ikki trupult at fylgja tonkum hansara. Sum tit síggja á myndunum, so sær staðið lítið tespiligt út. Hetta staðið, sum kommunan einaferð ætlaði skuldi vera ein bingjuhavn.

## Eigur ikki at koma fyri

Elin Lindenskov er forkvinna í Umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar Kommunu, og hon heldur ikki, at Oyrareingir er gloymt burtur: – Við tiltakinum í farnu viku, vildu vit rudda alla kommununa, og gera Tórshavnar Kommununu meiri reina, og tað haldi eg eisini vit hava megnað, sigur forkvinnan í Umhvørvisnevndini. – Men eg eri púra samd í, at tað als ikki eigur at koma fyri, at eitt pláss sleppur at liggja í órøkt sum ídnaðarøkið á Oyrareingjum. Tað er sera óheppið. Men økið hoyrir til Tórshavnar Havn, og har var eg fríggjadagin og spurdi meg fyri, men tey hava onga formella klagu fingið um óskilið har, søgdu tey. Men tað broytir ikki uppá tað, at tað eigur og skal vera ruddað skjótast gjørligt, staðfestir Elin Lindenskov.

Elin Lindenskov sigur, at hon og Umhvørvisnevndin fara at fylgja málinum upp og tryggja sær, at arbeiðið verður gjørt. Hetta skal ætlandi vera gjørt innan fyri tveir-tríggjar mánaðir. Tað hava bæði borgarstjórin, Heðin Mortensen, og Heilsuumsitingin avtalað við Havnafútan.

## Gott við umhvørvisviku

Elin Lindenskov sigur, at tey annars sum heild eru væl nøgd við umhvørvisvikuna. – Hetta við at seta fokus á umhvørvið av og á, er sera gott. Tak bara dømi við ídnaðarøkinum á Oyrareingjum. Uttan hesa umhvørvisvikuna hevði tað helst ikki verið varpað ljós á økið har, og so hevði økið helst sloppið at ligið líka órørt og óruddiligt longi aftrat, sigur Elin Lindenskov, forkvinna í Umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar Kommunu.